## Úr Løgtinginum



# Framløgu-fundur

*38 uppskot vórðu løgd fram á serligum tingfundi leygardagin*

John Johannessen

Leygardagin klokkan hálvgum tvey seinnapartin varð serligur tingfundur hildin við eittans málið á dagsskránni.

Talan var um ein tingfund, har tey mongu málini, borin vórðu úr landsstýrinum til løgtingsskrivstovuna fyrr í vikuni, vórðu løgd fyri tingið. Mikudagin var nevniliga seinasta freist hjá landsstýrinum at leggja uppskot fyri tingið.

Mikudagin var eisini seinasta freist hjá andstøðuni at leggja uppskot fyri tingið, tískil komu tilsamans eini 38 lógaruppskot inn á løgtingsskrivstovuna, áðrenn hon lat aftur klokkan fýra.

Øll hesi uppskotini legi tingformaðurin, Finnbogi Ísakson, fyri tingið leygardagin, harafturat boðaði hann eisini frá einum fyrispurningi frá Katrin Dahl Jacobsen til Karsten Hansen, landsstýrismann í fíggjarmálum, um skattligu viðurskiftini hjá sjómonnum við útlendskum skipum.

# Stór frávera

John Johannessen

Av tí, at einasta málið á dagsskránni fyri tingfundin leygardagin var framløga av tingmálum, vóru tað nógvir tinglimir og fleiri landsstýrisfólk, ið ikki møttu til tingfundin.

Teir níggju løgtingslimirnir, Jógvan við Keldu úr Fólkaflokkinum, Vilhelm Johannesen úr Javnaðarflokkinum, Jóannes Eidesgaard úr Javnaðarflokkinum, Flemming Mikkelsen úr Sambandsflokkinum, Jákup Sverri Kass úr Sjálvstýrisflokkinum, Sámal Petur í Grund úr Sjálvstýrisflokkinum, Páll á Reynatúgvu úr Tjóðveldisflokkinum, Heini O. Heinesen úr Tjóðveldisflokkinum og Finnur Helmsdal úr Tjóðveldisflokkinum vóru ikki á fundi.

Seks landsstýrisfólk vóru ikki á fundi, og vóru tey Høgni Hoydal, Karsten Hansen, Jørgen Niclasen, Signar á Brúnni, Finnbogi Arge og Helena Dam á Neystabø.

Tingfundurin leygardagin var ógvuliga stuttur. Hann varð settur klokkan 13.30 og slitin klokkan 13.50.

# Nógv mál á skránni

John Johannessen

Heili tólv mál eru á skránni fyri tingfund nummar 62 hesa tingsetuna, sum verður settur í dag klokkan hálvgum tvey.

Talan um fýra fyrstu viðgerðir, tvær aðru viðgerðir tvær atkvøðugreiðslur um fyrispurningar, tvey svar uppá fyrispurning og framløgu.

Fyrsta fyrsta viðgerðin er av tingmáli nummar 61/1999, sum er uppskot til løgtingslóg um endurgjald til kommunur í sambandi við, at sjóvegis farleiðir hjá Strandfaraskipum Landsins verða lagdar niður.

Onnur fyrsta viðgerðin er av tingmáli nummar 53-6/1999, sum er grannskoðan av almenna roknskapinum hjá Føroya Jarðargrunni fyri fíggjarárið 1998.

Triðja fyrtsa viðgerðin er av tingmáli nummar 58/1999, sum er uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl.

Seinasta fyrsta viðgerðin er av tingmáli nr. 59/1999, sum er uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum.

# Norra, Svøríki og partar av Baltikum sett tiltøk í verk

*Kann landsstýrismaður við vissu siga, um fóður til føroysk neyt er vandaleyst? spyr Dan R. Petersen m.a. Finnboga Arge í fyrispurningi*

Ólavur í Beiti

– Eru nøkur fyribyrgjandi tiltøk sett í verk, nú neytaøði er staðfest í Danmark? Innflyta vit neytakjøt úr Onglandi? Hevur tann føroyski myndugleikin nakran ávísan politikk mótvegis londum, ið nýta tað í viðmerkingunum nevnda fóður? Kann landsstýrismaður við vissu siga, um fóður til føroysk neyt er vandaleyst?

Og at enda spyr Dan R. Petersen, um tey tiltøk, ið sett eru í verk ímóti ridluskriða í Føroyum, eru nøktandi?

Í viðmerkingunum til spurningarnar, sigur Dan R. Petersen, at gjøgnum øldir vóru føroyingar sjálvforsýnaðir við døgurðamati. Seinasta mansaldur er hetta broytt. Bústaðar- og lívsmynstrið ger, at døgurðamatur í stóran mun er keypt útlendskt kjøt.

– Í útlondum halda brúkarafeløg, starvsstovur, og veterinermyndugleikar eitt vakið eyga við tí mannaføði, ið fæst til keyps. Her heima røkir Heilsufrøðiliga Starvsstovan hesa uppgávu eftir førimuni og orku. M.a. hevur starvsstovan forða fyri sølu av salmonellafongdum høsnarungum og øðrum flogfenaði.



### Stavar frá fóðri

– Dagliga hoyra vit um smittað sláturdýr og smittaðar úrdráttir úr húsdýrum. Ongland hevur seinastu árini verið rakt av neytaøði og er av teirri orsøk boykottað av fleiri londum.

– Í seinastu viku var ein tilburður av neytaøði staðfestur í Danmark, og fleiri kunnu væntast. Norra, Svøríki og partar av Baltikum hava longu sett tiltøk í verk ímóti innflutningi úr Danmark.

– Neytaøði stavar frá fóðri, ið partvís er framleitt úr avnotum av neyti, beinamjøli, heila, mønu, eygum og øðrum, ið ikki verður nýtt til mannaføði. Av tí at kjøt av sjúkum kríatúrum kann føra ólekjandi, deyðiliga sjúku við sær, verða omanfyri settu spurningar reistir, sigur Dan R. Petersen.

# Skipar Mentanargrunnin við lóg

*Grunnurin skal serliga stuðla tiltøkum og verkætlanum, sum kveikja og menna føroyska myndlist, tónlist, bókmentir, sjónleik og aðra list, sum kann javnmetast við hesar listagreinir*

Ólavur í Beiti

Signar á Brúnni, mentamálaráðharri, hevur vegna landsstýrið lagt fram uppskot um Mentanargrunn Løgtingsins, sum kemur at hava sama stovnsfæ sum stovnsfæið hjá Mentunargrunni Føroya Løgtings sum varð stovnsettur 6. mai 1946 á føðingardegi Jóannesar Paturssonar.

Í viðmerkingunum til uppskotið um grunnin, sigur Signar á Brúnni, at í sambandi við at arbeitt verður í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum við eini mentanarpolitiskari ætlan fyri skapandi og útinnandi list, ætlar landsstýrismaðurin í mentamálum at skipa Mentanargrunnin við lóg.

– Endamálið við ætlanini er, at tað skal bera til at gera eina virkisætlan fyri skeiðið 2000-2005, har ásett verður, hvørji øki eiga at verða raðfest í tíðarskeiðnum. Ætlanin er at leggja dent á skapandi og útinnandi list, at økja um møguleikarnar, sum longu nú eru, og at játta starvslønir. Tað hevur víst seg, at skipanin við starvslønum hevur havt stóran týdning fyri eitt nú yrkjarar og rithøvundar. Við øktu møguleikunum verður nú bøtt munandi um hesar møguleikar, og verður við hesum gingið einum sterkum ynski frá listafólkum á møti.

### Forløg fáa eisini

– Sambært lógaruppskotinum fær landsstýrismaðurin í mentamálum heimild at áseta nærri reglur fyri grunnin. Ætlanin er, at meira av játtanini skal fara til skapandi og útinnandi listafólk. Men tað er tó ikki ætlanin at sleppa siðvenjuni at játta pening til forløg, tó so, at dentur verður lagdur á at játta til útgávu av eitt nú dygdargóðum handritum, sum, nevndin metir, eiga at verða givin út, men sum kanska ikki koma at bera seg fíggjarliga. Mentanargrunnurin skal framvegis lata stuðul til ymiskar verkætlanir, framførslur og framsýningar.

– Meginreglan fyri umsitingini av Mentanargrunni Løgtingsins og játtanum úr grunninum verður frameftir tann sama, sum hevur verið galdandi, síðan grunnurin varð stovnaður, nevniliga, at hóast nevndin verður vald av politiskum myndugleika, so hevur nevndin allan myndugleikan at játta pening eftir umsókn og sambært tí reglugerð, ið landsstýrismaðurin ger við støði í lógini.

– Henda skipan, at politiski myndugleikin als ikki leggur seg út í málsviðgerðina av umsóknum og avgerðir um játtan, er ein vanlig galdandi meginregla í Norðurlondum, tá talan er um stuðul til mentanarlívið. Ætlanin er at fylgja hesi meginreglu við tí kunngerð, ið kemur í sambandi við lógina, sigur Signar á brúnni m.a. í viðmerkingunum til uppskoti um nýggja grunnin.

# 101 ára gamal afturvaldur



*101 ára gamli Erik Finnemann Bruun er júst afturvaldur sum formaður í felagnum hjá fyrrverandi fólkatingsmonnum. Hann hevur sett met - og er kom í metbókina hjá Guinnes…*

Eirikur Lindenskov

Fyrrverandi fólkatingslimir hava eitt felag, teir nevna forhenværende Folketingsmedlemmers Forening - og teir hava nú fingið eitt met í bókina hjá Guinnes. Tann 4. oktober 1998 kom felagið í Guinnesmetbókina, tí felagsins aktivi formaður, Erik Finnemann Bruun, tann dagin fylti 100 ár. Hann varð tá kosin »elsti fungerandi felagsformaður í Danmark«.

Og nú, tá hann er á veg móti 102. føðingardegi sínum, hevur felagið afturvalt han til formann.

Finnemann Bruun var konservativur fólkatingsmaður í truplastu tíðini hjá fólkatinginum, frá 1943-45 - undir týsku hersetingini. Tá var ikki nógv virksemi í fólkatinginum, so í veruleikanum hevur hann bara virkað sum fólkatingsmaður í nakrar mánaðir.

Erik Finnemann Bruun, sum er hevur annars í mong harrans ár starvast sum embætismaður í Fólkatinginum, og hann hevur eisini verið í Føroyum. Hetta var einaferð í 20'unum, tá hann var í Føroyum við ferðalag hjá Stauningi, forsætisráðharra.

Næstformaðurin í felagnum hjá fyrrverandi fólkatingslimum er ein rættuligur ársungi í mun til Finnemann. Tað er 71 ára gamla Tove Lindbo Larsen, fyrrverandi ráðharri og fólkatingskvinna fyri Javnaðarflokkin í trimum skeiðum frá 1971 til 1998.





*Veldugir land mundu væla:*

# Farnir undir várróðurin

*Enn sum áður er Norðhavið álitið hjá útróðrarmonnunum. Teir koma langvegis at tryggja sær part av várróðrinum norðanfyri*

Edvard Joensen

Høgættin er bítandi køld á Eiði. Kavin liggur í sjóvarmálan og vindurin strýkur suður eftir fjørðinum.

Norðhavið, sum enn er álitið hjá útróðrarmanninum, sum tað var bæði fyri og eftir, at Mikkjal á Ryggi yrkti um áttamannafarið, er ikki í serliga góðum skørum í dag. Torvanes liggur javnt undir, og tað brýtur langt upp á Líðarenni.

Við nøsini rætt upp í vindin koma fýra bátar grøvandi norður eftir Sundalagnum. Ivaleyst nakrir suðringar, sum ætla sær at rógva út norðanfyri, nú várróðurin stundar til, verður tosað.

Tað er bara ein háttur at finna út av, um soleiðis er. Tað er at fara at tosa við menninar.

Og »mikið rigtugt«, sum gomul fólk viðhvørt enn taka til. Tað vóru suðringar, sum komnir vóru norður um at vinna sær nøkur oyru.

Hetta, at fremmandamenn koma norður um hesa ársins tíð, er vorðið alt meira vanligt seinnu árini. Nú eru umstøðurnar eisini vorðnar nógv betri, enn tær vóru fyrr. Havnarviðurskiftini eru góð. Væl ber til at sleppa av við fisk, og bátarnir eru so mikið stórir, at menn fáa búleikast umborð.

Umborð á Egili M er Arthur einsamallur. Tveir av hinum trimum bátunum, sum komu úr Trongisvági hendan dagin, eru eisini mannaðir av einsamøllum monnum. Við tí triðja eru teir tveir mans.

Arthur sigur frá, at teir hava verið her nú í fleiri ár á rað. Og tað ber til, letur hann at. Sjálvur hevur hann ein hampiliga stóran glasfipurbát, eins og hinir, sum komnir eru. Allir eru teir trongisvingar, sum komu hendan dagin.

Teir vóru komnir norður um fjørðin mikudagin í seinastu viku. Dagin fyri illveðrið, sum legði partar av landinum lamnar. Men hjá teimum bilti ikki. Teir fóru fyrst á Runavík og lógu so har einar tveir dagar, áðrenn avgjørt varð at fara til Eiðis.

Tað er høgligt at rógva út av Eiði. Arthur sigur, at teir okkurt ár hava verið í Oyndarfirði, men ymisk viðurskifti gjørdu, at teir fóru til Eiðis. Og á Eiði hevur teimum dámt væl. Gott at liggja og lætt at sleppa av við fiskin.

Tað døggar nakað illa í stýrihúsinum á Egili M. Arthur kókar grind í lugarinum. Hann hevur riggað sær eina koyggju í ár, greiðir hann frá. Fyrr hevur hann sovið á bonkinum, men hetta er nógv betri. So nú er trengri, enn tað hevur verið. Men hann heldur tó, at einir tveir mans fáa sitið við borðið, og so er einki fyri at rætta døgurðan um lúnningina til bátin, sum liggur uttaná. Hann kókar til allar, sigur hann.

Vit práta um leyst og fast, og Arthur fegnast um, at nú ber aftur til at fiska frítt við snelluni norðanfyri.

Hann helt lítið skil vera í, at leiðir vóru stongdar fyri snelluveiðu á Norðhavinum í fjør. Makan til fávitsku hevur hann ikki kent, heldur hann. Tí einum er hann 100% vísur í, og tað er, at snellan oyðir ongan stovn.

Harragud, tá fiskurin ikki sjálvur vil taka, er einki at gera við hann. So svimur hann víðari og fríggjar og gýtir, sum hann vil. Øðrvísi er við trolarunum. Teir geva ongum frið, so har er í lagi at stongja, eru suðringarnir púra samdir um.

Eitt er, at tíðin er góð til fiskiskap norðanfyri. Men sunnan fyri er púra eiðasørt, láta teir at, so tað er ikki so nógv at ivast í hjá teimum, siga teir. Og teir siga frá, at tveir aðrir suðuroyarbátar eru komnir undan teimum, og fleiri eru væntandi. So alt í alt verður tað ein fittur floti, sum væntast kann at taka støð á Eiði, nú várróðurin rættiliga skuldi farið í gongd.

Men sum er sær púra einki út. Veðrið hevur verið rættiliga ólagaligt, og hendan dagin var so ikki hugsandi um at fara gjøgnum Flógvan við so smáum bátum.

Hinir báðir suðuroyarbátarnir, sum fyrr vóru komnir norður, høvdu verið onkran dag, visti Arthur at siga frá. Annar hevði fingið góð 1.000 pund. So við prísinum, sum er í dag, er tað bara »allright«, halda teir.

Tað hanga nakrar dergur á skottinum. Nakrar eru av gamla, traditionella slagnum, meðan nakrar hava snaraðar buktir.

Tað er tí, sigur Arthur, at teir eru farnir at halda tað vera betri. Teir halda, at beitan stendur betri frá, tá buktin er snarað.

»Men jeg veit ikki. Jeg havi ikki verið har niðri og sett tað sjálvur«, sigur hann. Men hann vil tó royna tað, tá nú aðrir siga tað vera best.

So er kókað, heldur Arthur og fer at leggja uppúr. Hann rópar á menniniar í hinum bátunum, at nú er skaffitíð, og teir koma beinanvegin at fáa sær.

Og meðan eiðismenn gera tunnuna klára at sláa um kvøldið, sita fýra suðringar niðri við flótibrúnna og eta grind, sum Arthur hevur kókað á oljukabússini í lugarinum á Egili M.


